*KAP. 8.*

# Lýsing av, hvørjar stýrisskipanarreglur neyðugar eru afturat, skulu Føroyar hava fult sjálvstýri

# I Broyting av donsku grundlógini

Um so er at ynskt verður, at Føroyar fáa støðu sum sjálvstøðugt land, er ikki neyðugt at danska grundlógin verður broytt.

Tá verður – eins og við Ísland í 1918 – gjørdur ein sáttmáli millum stjórnina í Føroyum og stjórnina í Danmark um, at Føroyar skulu gerast eitt sjálvstøðugt land.

Danska grundlógin sigur í grein 19, at hetta er eitt av teimum málum, sum stjórnin av sínum eintingum ikki kann gera av, men skal tað leggjast fyri fólkatingið til viðgerðar. Av øvugdømi av hesi grein skilst, at heimilað er eftir hesi mannagongd at skilja ein part av ríkinum frá uttan grundlógarbroyting.

Í fólkatinginum verður eitt slíkt uppskot viðgjørt sum uppskot til samtyktar, sum skal verða lagt fram og fáa tvær viðgerðir. Síðan skal uppskotið háveldisstaðfestast; men so er tað galdandi fyri danska ríkið, og hesin sáttmáli hevur gildi fram um ta donsku grundlógina. Tá er so einki at ivast í, at danska grundlógin ikki er galdandi fyri Føroyar, tí hon sigur í síni 1. grein, at hon er galdandi fyri alt Danmarkar ríki. Tað, sum ikki er í danska ríkinum, er grundlógin ikki galdandi fyri, og tí verða hinar ásetingarnar í grundlógini um Føroyar eisini ógildar.

# II Samtykt av eini føroyskari grundlóg

Um so er, at Føroyar gerast sjálvstøðug tjóð, má samtykkjast ein grundlóg fyri Føroyar.

Uppskot nevndarinnnar á bls. 152 til løgtingslóg um stýrisskipan Føroya kann nýtast sum grundarlag fyri slíkari grundlóg, um reglurnar um ríkislógartilmæli verða tiknar úr lógini, § 46 – § 51, § 53 og § 57, stk. 2, verða avtiknar. Harafturat skal § 52 tillagast soleiðis, at landsstýrið tá altíð hevur heimild at tingast við onnur lond. Harumframt mugu setast inn reglur um føroyskan heimarætt og ávís nærri ásett frælsisrættindi.

Ein føroysk grundlóg kann verða gjørd á tann hátt, at løgtingslóg um tjóðfund verður samtykt, val til tjóðfund fer fram, og tjóðfundurin samtykkir grundlóg.[100]

[100]. Hvussu hetta kann fara fram er lýst í bókini Tjóðfundarleiðin. – Keypmh., 1945 eftir Dánjal Paula Dánjalsson á Ryggi.

# III At lóggeva og skipa fyri fyrisiting av írestandi yvirtøkum og taka yvir tey málsøki, sum í dag ikki kunnu yvirtakast sbr. heimastýrislógini

Føroyingar mugu her á landi skipa eina fyrisiting undir landsstýrinum, sum kann taka sær av uttanríkisáhugamálum Føroya. Harafturat mugu sendistovur stovnast í teim londum, har hetta er neyðugt.

Stovnsetast má ein føroyskur yvirrættur, sum mál hjá sorinskrivara-embætinum kunnu skjótast inn fyri. Tilnevningarskipan má gerast soleiðis, at dómarar og fulltrúar við sorinskrivara- og yvirrættarembætið verða tilnevndir á slíkan hátt, at teir eru púra óheftir av landsstýri og løgtingi.

Ákæruvaldið má umskipast sum stovnur undir landsstýrinum.

Almanna- heilsu- og skúlamál mugu endaliga yvirtakast her á landi.

Fólkakirkjan má yvirtakast.

Løgreglan, fongsulsverkið og kriminalforsorg má skipast undir landsstýrinum.

Loftferðslueftirlitið, radiosamferðsla, vitaverk, skipaeftirlit, borgaraliga tilbúgving (civilforsvar) má skipast undir landsstýrinum.

Landsstýrið má taka sær av fyrisitingini í persóns- , familju- og arvrættarligum málum.

# IV Avtala við donsku stjórnina (ella aðra stjórn) um aðrar veitingar

Sum sjálvstøðugt ríki kunnu Føroyar ikki hava allar tær tænastur, sum samfelagnum tørvar, og má avtala gerast við donsku stjórnina (ella annað ríki) um hesar og kostnaðin av hesum.

Nevnast kann, at avtala má gerast um samstarv við størri sjúkrahús, at føroyingar fáa atgongd til lærustovnar í Danmark ella øðrum londum, at sendistovur í londum langt av leið eisini taka sær av føroyskum áhugamálum har, og at aðrir taka sær av ávísum øðrum tænastum, sum vera so sjáldan nýttar her á landi, at illa ber til at hava hesar burturav t.d. eftirlitinum við loftferðslu, sakargransking í størri brotsmálum osfr.